# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Neyðugt at finna tað, ið skerast kann

Um vikuskiftið samtykti løgtingið fíggjarlógina fyri 2010, hóast hon var nógv broytt í mun til tað, sum ætlað varð. Tann í summar so gitini ólavsøkupakkin, hann helt kortini ikki, og tí mátti fíggjarlógin broytast hareftir.

Í miðlunum var tað serliga stríðið um tunnlarnar norður um fjall, sum hevur ørkymlað, tí tann altíð so sterki fyrrverandi leiðarin í Fólkaflokkinum, Anfinn Kallsberg, hevur sett sær fyri at fáa hesa verkætlan framda.

Men koritni varð einki sett av til hesa verkætlan, sum tí er skotin longur út. Sama skilið er við Sandoyartunlinum – og í blaðnum í dag gevur Gerhard Lognberg til kennar, at hann er blotnaður – og heldur allar súður ikki verða syftar enn.

Tað er klárt, at kamelar skulu slúkast, tá fíggjarlógin skal leggjast – ikki minst, tá tíðirnar eru strammar, sum nú.

Jóannes Eidesgaard hevur boðað frá, at hann hevur brúkt tann »primitiva mátan« við plenuklipparanum, sum hann málbar seg. Hetta er helst tí at hann viðgongur, at tað ikki hevur eydnast fíggjarmálaráðharranum og hansara fólki at finna sparingar, sum politiskt kjølfesti er fyri.

Tað skerst ikki burt, at skulu veruligar sparingar gerast, so eiga vit at hyggja upp á dupultfunktiónir í samfelagnum – og eisini taka støðu til, hvørjar tænastur vit mugu velja frá. Tað ber ikki til bara at koyra víðari og látast sum at alt ber til, samstundis sum tað skal ganga út yvir veikaru samfelagsbólkarnar.

Tað verður so uppgávan hjá fíggjarmálaráðharranum og samgonguni til næstu fíggjarlóg at finna fram til, hvat kann skerast burtur. Plenuklipparin kann ikki brúkast fleiri ferðir – og um skattgjaldarin skal hava álit á politikarunum, so er tað sera umráðandi, at hann sær, at skil er í – og at skynsamar avgerðir eru grundarlag undir fíggjarlógini. At skera yvir ein kamb kann vera neyðugt viðhvørt, men tað er ikki skynsamur politikkur. Vónandi verður bøtt um hetta til næstu ferð.

**Sosialurin**

## Ein sera jalig 1. viðgerð av Vága Floghavn

**FRANK DAVIDSEN**
Sørvágur



Samstundis sum málið er latið vinnunevndini, og umboð fyri flogskipararnar hava givið sítt íkast, ið ikki segði okkum meira, enn flest øll vóru vitandi um frammanundan, so tykist ein loysn vera í eygsjón.

Fyri tað fyrsta so afturvísa umboðini fyri flogskipararnar staðiliga, at ivi er um trygdina. Var minsti ivi um operationellu trygdina, so hevði eingin flogskipari sett seg umborð á nakað flogfar. Víðari verður sagt, at flogvallaviðurskiftini ikki eru optimal, tí flogbreytin er stutt og smøl, og ger hetta, at bert ávísar flogtypur kunnu brúkast - jamen er tað ikki millum annað júst tí, at flogvøllurin skal leingjast?

Tá umboð fyri flogskipararnar seinni í tíðindaskrivinum gera vart við, citat: "Flestu forðingar í Vágum eru ikki orsaka av ov stuttun vølli. Tær eru orsaka av vánaligum sýni, vindi av lágætt (sunnan og útsynningursunnan) og norðanvindi á vetri (síðuvindur og kavi)," citat endað, so hevur ein ilt við at skilja, at í reglubrotinum beint omanfyri verður sagt, at flogvallaviðurskiftini ikki eru optimal orsaka av ov stuttun vølli. Ein mótsøgn av dimensjónum.

Tá umboðini fyri flogskiparnar harafturat geva løgtingsumboðum og vanliga lesaranum ta fatan, at teir hava 20 ára royndir við flúgving uppá Føroyar, so er tað sera villleiðandi fyri ikki at siga ósatt. Av teimun flogskiparum, ið arbeiða hjá Atlantsflog í løtuni, er tað mær vitandi bara flogstjórin, ið hevur hesar royndir. Úbyggingin av Vága Floghavn, har fíggingin hevur verið tøk í 4 ár, hevur einki við ein framtíðarflogvøll at gera, um hann so verður á Skorðhæddini, á Glyvursnesi ella í Søltuvík.

Bara hugsanin um eina íløgu uppá fleiri milliardir, har tú bindir landskassan, sum kemur at hava eitt risahall komandi árini, er einfalt ein hvørvisjón.

Búskaparráðið hevur roknað seg fram til, at í besta lagi kunnu vit fáa javnvág á fíggjarlógini í 2014. Men tá skylda vit 4 milliardir. Tí er tað heilt burtur við, at ein leinging av flogvøllinum til 1799 metrar verður sett upp ímóti eini útbygging av terminalinum. Henda útbyggingin snýr seg um 47 milliónir krónur, sum kanska er 2% av kostnaðinum av nyggjum flogvølli.

Líka mikið hvat, so verður flogvøllurrin í Vágum loftvegis sambandið við meginlandið næstu 10 - 15 árini. Sosatt verður lagt upp til, at terminalurin, sum er bygdur í hálvfjersunum, skal standa eina hálva øld, uttan at hond verður tikin um hann. Tað er púra burturvið.

Annars hendið tað sera løgna fyribrygdi á Løgtingi, tá 1. viðgerð var um flogvøllin, at eingin av teimun, sum bæði í skrift og talu hava verið ímóti útbyggingini av Vága Floghavn, vóru til staðar undir viðgerðini og tí heldur ikki tóku orðið.

Nú fáa vit at síggja, hvussu málið sær út, tá vinnunevndin er liðug við álitið, og tað verður lagt fram til 2. og 3. viðgerð. Tað er bara at vóna, at vit fáa ein flogvøll upp á 1799 metrar og ein nútímansgjørdan terminal.

Og hvør veit, tá ið tilboðini verða latin upp, kann væl vera, at ikki verður neyðugt við teimun 47 milliónunum, sum stríðið stendur um, tí arbeiðið verður bíligari, enn roknað varð við.

Annars ynski eg øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

## Viðmerking til opið bræv, dagf. 10. 12. 2009

**MARTIN NÆS**
formaður,
Listasavn Føroya



Í tíðindaskrivi 24. november 2009 varð boðað frá , at stýrið fyri Listasavn Føroya hevði gjørt av at leingja setanina av Helga Fossádal frá 1. mars 2010 til 1. mai 2011. Orsøkin til hetta er, at talan er um møguligar bygnaðarbroytingar á savnsøkinum, og í hesum sambandi metti stýrið, at tíðin beint nú ikki var búgvin at lýsa eftir nýggjum stjóra, og heitti stýrið tí á Helga Fossádal um at halda fram til 1. mai 2011. Í almennu umrøðuni er longdin av starvssetanini og orsøkin til hesa avgerð líkasum kámað burtur. Tí vil stýrið enn einaferð gera vart við orsøkina til at leingja avtaluna við Helga Fossádal. Vart skal eisini gerast við, at henda mannagongdin er vælkend frá líknandi starvssetanum hesi árini. Upplýsast skal, at Helgi Fossádal hevur tikið av tilboðnum. **Stýrið vil samstundis vísa øllum atfinningum, sum eru komnar móti stjóranum og leiðsluførleika hansara, aftur og tekur fult undir við honum.**

Við ynskjum um eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.